# Hálvur føroyingur longt sáttmálan við Bournemouth

*Claus Bech Jørgensen fær meira sentralan leiklut á liðnum hjá Bournemouth næsta kappingarár*



*Hálvi føroyingurin, Claus Bech Jørgensen, hevur nú longt sáttmála sín við Bournemouth, sum spælir í triðbestu ensku deildini*

24 ára gamli Claus Bech Jørgensen, sum hevur føroyska mammu, hevur nú longt yrkissáttmálan við enska felagið Bournemouth.

Farni árið hevur hann spælt í enska 2. deildarfelagnum, eftir at hann fyri hálvum øðrum ári síðani gjørdi ein eitt ára sáttmála við enska felagið.

Nú er fyrsta árið í enskum fótbólti av, men leiðslan í Bournemouth er so væl nøgd við Claus Bech Jørgensen, at teir hava longt sáttmálan við hann, og næsta kappingarár kann hann vænta sær ein meira sentralan leiklut á liðnum.

Í hesum kappingarárinum gjørdi Claus 6 mál fyri Bournemouth, umframt at hann legði upp til nógv mál.

### Størri ábyrgd

Claus Bech Jørgensen, sum frammanundan spældi í danska felagnum AC Horsens, er nú í summarfrí heima hjá mammu síni í Danmark, men um nakrar vikur skal hann aftur til Englands at taka venjingina uppaftur.

– Nú má tað røkka ella støkka. Fyrsta árið gekk væl, men nú kann eg vænta, at størri ábyrgd fer at liggja á mær, og so skal eg vísa, at kann klára slíka ábyrgd, sigur hann.

Claus Bech Jørgensen avvísir ikki, at hann hevur hugt at spæla á føroyska fótbóltslandsliðnum, men hann vil ikki taka støðu til tað, fyrr enn hann hevur fingið ein ítøkiligan fyrispurning úr Føroyum. Og enn hevur hvørki Fótbóltssambandið ella landsliðsvenjarin, Allan Simonsen, vent sær til hansara.

EK

# Venjaraskeið

*Um vikuskiftið verður venjaraskeið hildiði í Havn, sum serliga er ætlað venjarum á hægri støði, men allir venjarar eru sjálvsagt vælkomnir*

Fríggjadagin (19/5) og sunnudagin (21/5) verður venjaraskeið í Havn. Skeiðið er ætlað venjarum við royndum, serliga venjarum í 1. deildunum, landsliðsvenjarum og hjálparfólkum, men allir venjarar eru sjálvandi vælkomnir.

Skeiðleiðari verður danin Niels Christian Petersen, ið fyrr hevur hildið skeið fyri HSF.

### Vitjan av Anju

Sumstundis sum skeiðið er, vitjar Anja Andersen í Havn og vit fáa høvi at fylgja hennara frálæru, sum verður í Gundadalshøllini í millum 15:00 og 18:00.

Evnini á skeiðnum verða fylgjandi:

**3:2:1 verja induvidiel verjuvenjing og kollektiv 3:2:1 verja**

**Innspæl/samanspæl til strikuspælara + álopsstartir við innspæli til striku**

**Fysisk venjing við vektum**

Rennitestir

Feløgini skula boða HSF frá, hvussu nógvir luttakarar felagið ætlar at tilmelda og nøvnini á viðkomandi persónum.

### Stutt um Niels Christian

Niels Christian er 50 ára gamal,og er frá Brabrand. Hann hevur vant 1. lið hjá Brabrand í nógv ár, men er í løtuni knýttur at danska kvinnu A-landsliðinum, har han m.a. arbeiður við videoanalysu fyri Jan Pytlick landsliðsvenjara.

Niels Christian er eisini venjara instruktørur í DHF'regi og undirvísur á elituvenjaraskeiðum ið DHF skipar fyri.

### Skráin við fyrivarni fyri broytingum:

19/5 í Gundadalshøllini
11:00 - 13:30 álopsvenjing
14:00 døgverði
15:00 - 18:00 støðgur (Anja Andersen)
18:15 - 20:15 fysisk venjing (styrkivenjing).

21/5
11:00 - 13:00 fysisk venjing (tests + renning)
13:30 døgverði
15.00 - 17.30 venjing í høll - verjuvenjing

Møguliga verða onkrar broytingar. Vit geva nærri boð um tað

Liðið Niels Christian kemur at venja verður 1. manslið hjá Kyndli..

Vinarliga, við vón um góða undirtøku

SOPHUS EDWARD DAL CHRISTIANSEN

# Føroysku landsliðini hava úr at gera

*Komandi vikurnar skulu landsliðini hjá bæði U-20 gentunum og mansunglingum av landinum at royna seg í EM-undankapping, og gongur leiðin til ávíkavíst Minsk og Split*

JÁKUP MØRK

Hondbóltssambandi hevur rættuliga tikið dik á seg, hvat landsliðsarbeiðinum viðvíkur, og komandi tíðin verður ein spennandi tíð hjá nógvum føroyskum leikarum.

### Unglingar til Minsk

EM-undankapping fyri mansunglingar er fyrsta tiltakið, sum stendur fyri framman.

Føroysku mansunglingarnir skulu í hesum sambandi til høvuðsstaðin í Hvítarusslandi, Minsk.

Farið verður avstað týsdagin komandi, og skal føroyska liðið spæla tríggjar dystir á ferðini, har mótstøðuleikararnir koma úr Hvítarusslandi, Svøríki og Ungarn.

Tey bæði fremstu liðini í bólkinum koma við til endaumfarið, sum verður spælt í Grikkalandi í august mánaði.

Venjari hjá føroyska liðnum er Svein Rógvi Nielsen, og afturat sær hevur hann Karl L. Johansen, hjálparvenjara og Jákup Durhuus, liðleiðari.

Spælararnir, sum ætlandi skulu við á ferðini eru hesir: Sveinur Justinussen, Jørmund Joensen og Pauli G. Hansen úr StÍF. Dánjal H. Kjærbo úr Stjørnuni. Bjarni Arnason og Heini Ellingsgaard úr Kyndli. Regin Petersen, Dan Thorleifsson, Ragnar Staksund, Vagnur Mortensen, Ræni Slættanes, Helgi K. Justinusen, Levi Tróndarson og Rói Eysturdal úr Neistanum.

### Genturnar til Kroatia

Eina viku eftir at mansunglingarnir eru farnir avstað, skulu U-20 kvinnurnar eisini leggja leiðina eystureftir.

Tær skulu , eins og dreingirnir, luttaka í EM-undankapping, og verður tað í Split í Kroatia, at tær skulu royna seg.

Føroysku kvinnurnar eru í bólki saman við Kroatia, Azerbadjan og Bulgaria, og verður tað bert vinnarin í bólkinum, sum tryggjar sær atgongd til endaspælið, sum verður í Fraklandi í august mánaði.

Venjarar hjá kvinnulandsliðinum eru Rene Kristensen og Flemming Raben, sum harumframt eisini fáa hjálp frá liðleiðaranum, Ann Rubeksen.

Venjararnir hava tikið 13 leikarar út til ferðina, og eru hesar:

Heidi Jacobsen, Tjaldur. Sólrun Jacobsen, Gurið Mortensen og Ingva Vestergaard úr VB. Nikolina Joensen úr VÍF. Svanna Kjær, Ada Joensen, Guðny Næs, Ata Høgnadóttir, Lív Sørensen og Rakul Augustinussen úr Neistanum. Fríða Johannesen úr Kyndli. Guðrun Ólavsdóttir og Elin Jacobsen úr StÍF.

### Kvinnurnar móti Svøríki

Lutakastið til komandi HM-undankapping fyri kvinnur var í Rumenia fyrradagin, og varð tá gjørt av, hvussu føroysku kvinnurnar skulu leika.

Úrslitið varð, at Føroysku genturnar í fyrsta umfari skulu spæla móti svenska landsliðinum, og verða dystirnir leiktir í ávíkavist november og desember í ár.

Um so er, at føroysku kvinnurnar megna at basa sviunum, skulu tær spæla tveir dystir í sonevndu Play-Off kappingini, har møguleiki er at vinna sær atgongd til endaspælið, sum verður í Italia í desember 2001.



*Ræni Slættanes úr Neistanum er ein teirra, sum um knappa viku skal til Minsk í Ukraina*



# Blóðugur bardagi í Keypmannahavn

*Týskvøldið fóru enskir og turkiskir fótbóltsáskoðarar til hendurs í danska høvuðsstaðnum. Ein breti var stungin í ryggin við knívi*



Týskvøldið hendi tað, sum ikki skuldi henda.

Fótbóltsviðhaldsfólk, sum vóru komin til Keypmannahavn at hyggja eftir UEFA-Cup finaluni í gjárkvøldið, fóru til hendurs í miðbýnum, og fleiri fingu skaða.

Arsenal úr Englandi og Galatasaray úr Turkalandi skuldu spæla fótbóltsdystin í gjárkvøldið, men fyrrakvøldið fóru viðhaldsfólkini longu í gongd, og tá løgreglan misti tamarhald á støðuni, varð rokið øðiligt.

Sambært danska Ekstrablaðnum byrjaði rokið, tá onkur tveitti eina fløsku eftir nøkrum turkiskum monnum, sum høvdu gjørt alt tað teir kundu fyri at fáa ilt í teir ensku áskoðararnar, sum hildu til á matstovuni, Abasalon, á Strøgnum.

Løgreglan legði upp í og royndi at spjaða mannamúgvuna, men áðrenn tað eydnaðist løgregluni at koma á mál, vóru fleiri enskir áskoðarar, sum vóru klárt í undirtali, bukaðir av, og fleiri ferðir noyddust meira sinniligir turkarar at forða fyri at tað ikki endaði heilt galið.

Ein enskur áskoðari varð stungin í ryggin, og í gjár var ógreitt, hvussu hann hevði tað.

### Ikki fyrstu ferð

Sama skil var eisini, tá enska felagið Leeds spældi dyst í UEFA-Cup kappingini í Turkalandi. Tá lótu tveir viðhaldsmenn lív undir rokinum, og síðani hevur rokaligt millum enskar og turkiskar fótbóltsáskoðarar.

Danska løgreglan hevur fyrireikað seg til ófrið í sambandi við finaludystin, og stórt løgreglulið skuldi verða á varðhaldið undir dystinum í gjárkvøldið.

Tíðindi hava gingið um, at áskoðarar úr Leeds ætlaðu sær til Keypmannahavnar at løna turkunum aftur fyri illgerðina, og donsku fjølmiðlarnir væntaðu í gjár, at løgreglan fór at hava nóg mikið at takast við í sambandi við dystin.

**ek**

# So komu teir

*Leingi hava klaksvíkingar bíða í spennindi, men nú eru leingi væntaðu jugoslavarnir komnir til landið*

JÁKUP MØRK

Fleiri ferðir hevur tað verið skrivað, at nú skuldi tað verða, men higartil hevur alla tíðina verið okkurt áfatt.

### Eru lendir

Eftir tógvið stríð hevur tað nú endiliga eydnast klaksvíkingunum at fáa teir báðar jugoslavarnar, 22 ára gamli áleyparin, Srecko Milicevic, og 32 ára gamla málverjan, Zoltan Kujundzic.

Klaksvíkingar hava frammanundan ein jugoslava á liðnum, nevnliga Tomislav Sivic, og er tað eisini hann, sum hevur fingið samband við teir báðar leikararnar.

Í týsdagsblaðnum skrivaðu vit, at áleyparin væntandi verður á vøllinum, tá KÍ fríggjadagin tekur móti B68, meðan tað var eitt sindur ivasamt við málverjanum, tí hann enn ongantíð hevur roynt seg á graslíki




*Á myndini síggjast frá vinstru Tomislav Sivic, Srecko Milicevic, Svend Jacobsen (formaður í KÍ) og Zoltan Kujundzic*

***Mynd: JH***

## Fimleikakapping í Ítróttarhøllini á Nabb

Fríggjadagin 19. mai, Dýra biðidag, kl. 15 og leygardagin 20. mai kl. 16 skipar Føroya Fimleikasamband fyri kapping í reiðskapsfimleiki fyri lið og einstaklingar í teimum eldru aldursbólkunum, 14–15 ár og 16 ár og eldri í Ítróttarhøllini á Nabb í Havn.

Dreingirnir kappast í lopi, gólvíðkan og ringum, meðan kvinnurnar kappast í lopi, gólvíðkan og íðkan á bita. Luttakandi liðini verða Havnar Fimleikafelag, Fimleikafelagið Ljósið, Fok úr Gøtu og Støkk av Glyvrum.

Fríggjadagin verður kapping fyri lið og leygardagin verður einstaklingakapping. Kappingin í ár er øðrvísi enn undanfarin ár, tí kappast verður fyri fyrstu ferð eftir internationalum reglum nevndar F.I.G. reglur. Hetta verður gjørt fyri at fimleikararnir betur kunnu fyrireika seg til Oyggjaleikir, ella um vit fara at luttaka í onkrari norðurlendskari kapping. Hetta hevur kravt eitt stórt fyrireikingararbeiði hjá dómarunum, sum skulu seta seg inn í teir ymisku dømingarreglurnar, tey ymisku lopini og mangt annað. Tað er Anni Kyster, sum hevur umsett reglurnar til okkara tørv við hollari hjálp frá Marjun Thomassen, sum fyri nøkrum árum síðani tók prógv sum altjóða fimleikadómari og tær eiga stóra tøkk uppborna fyri teirra avrik.

Tá kappast verður eftir F.I.G. reglum, er tað venjarin og fimleikarin, sum gera av hvørji lop teir leypa, teir kunnu hava tvey ymisk lop. Í ringum, á bita og á gólvi eru nøkur moment, sum skulu vera við og so kann fimleikarin taka onnur moment upp í og soleiðis byggja íðkanina upp til eina heild alt eftir hvussu hann/ hon er fyri kropsliga. Íðkan á gólvi og á bita er tíðaravmarkað smb. F.I.G., men av tí at hetta er fyrsta árið, vit royna hetta, verður fimleikarin ikki bundin av sekundum, men næsta kappingarár verður tíðaravmarkan sett í verk.

Vikuskiftið 29. og 30. apríl í ár skipaði F.F.S. fyri lið- og einstaklingakapping í Ítróttarhøllini á Kambsdali fyri teimum yngru deildunum, tíverri hendi tað mistak, at teir fimleikarar, sum vunnu í teimum ymisku greinunum fyri einstaklingar, fingu ikki heiðursmerki sum teir annars áttu at fáa, hetta var eitt keðiligt mistak, men leygardagin 20. mai kl. 16, tá kappingin fyri einstaklingar verður, verða heiðursmerkini handað teimum, sum áttu at fáa gull, silvur og bronsu.

Spennandi verður, hvussu fer at gangast fimleikarunum komandi vikuskifti, tí liðini eru sera jøvn, og spennandi verður at síggja, hvussu teir hava sett sínar íðkanir saman.

Vónandi fara nógv fólk at leita sær niðan á Nabb fríggjadagin og leygardagin at stuðla fimleikarunum í hesi fyri okkum nýggju kapping.

